

## Karsten avloysti Magna

Í gjár var vaktarskifti í Fíggjarmálaráðnum, tá Karsten Hansen loysti av Magna Laksafoss sum landsstýrismaður í fíggjarmálum. Bæði fráfarandi landsstýrismaðurin og nýggi landsstýrismaður søgdu nøkur orð, og Petur Alberg Lamhauge handaði teimum blómur. Frá starvsfólkunum í Fíggjarmálaráðnum og á Lønardeildini fekk Magni Laksafoss ein málning úr Vágum, sum Pól Skarðsenni hevur málað.



# Føroyingar við í CIA-arbeiðsbólk



*Edmund Joensen er nú fólkatingsmaður, og hann ætlar sær at brúka nógva tíð til fólkatingsarbeiðið*

**- Føroyskir myndugleikar fáa atgongd til allar upplýsingar, ið koma fram, nú danska stjórnin fer at hyggja nærri at upplýsingum um møguligan CIA-fangaflutning í loftrúminum hjá Grønlandi og Danmark, sigur Edmund Joensen, fólkatingsmaður**

**FÓLKATINGIÐ**
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Ljós verður nú sett á spurningin, um amerikanska fregnartænastan, CIA, ólógliga hevur brúkt grønlendskt og danskt loftrúm til flutning av fangum. Tað sigur Edmund Joensen, fólkatingsmaður.

– Føroyingar fáa atgongd til allar upplýsingar. Harumframt er greitt, at um tað kemur fram í ljósið, at føroyskt loftrúm er brúkt ólógliga, so verða aktivitetir í føroyskum loftrúmi eisini væl og virðiliga eftirhugdir, sigur hann.

Hetta er greitt, eftir at Edmund Joensen hevur tosað við Per Stig Møller, uttanríkisráðharra.

- Eg fegnist um samstarvið við donsku stjórnina um CIA-málið, ið kemur til viðgerðar í Fólkatinginum seinnapartin í. Tí er undirritaði eisini við sum uppskotstillari saman við stjórnini, ið skjýtur upp fyri Fólkatinginum, at stjórnin nú skal hyggja nærri at tíðindunum um ólógligan CIA-fangaflutning, sigur Edmund Joensen.

Orsøkin til, at hyggjast skal nærri at møguligum CIA-aktiviteti í loftrúminum hjá Grønlandi og Danmark, er ein dokumentarsending í Danmarks Radio í farnu viku. Í sendingini varð ført fram, at amerikanska fregnartænastan hevur staðið fyri fangaflutningi í grønlendskum loftrúmi.

Í sendingini hjá DR, “CIA´s danske forbindelse”, varð einki nevnt um føroyskt loftrúm. Kortini er nú tryggjað, at føroyskt loftrúm verður kannað, um ábendingar á nakran hátt koma um ólógligar aktivitetir á okkara øki – umframt at føroyingar fáa atgongd til allar upplýsingar í arbeiðsbólkinum hjá donsku stjórnini.

- Í arbeiðsbólkinum hjá stjórnini, ið skal koma við einari frágreiðing, eru umboð fyri danska Uttanríkisráðið, løgmálaráðið og Flutningmálaráðið – og so eru umboð fyri Føroyar og Grønland boðin at verða við í arbeiðinum, sigur Edmund Joensen.

Tað er av størsta týdningi, at loftrúmið hjá ríkisfelagsskapinum, herundir føroyskt loftrúm, ikki verður brúkt til endamál, sum stríða ímóti fólkarættinum ella við tí fyri eyga at bróta mannarættindi, heldur Edmund Joensen, fólkatingsmaður.

granskingarráðið
THE FAROESE RESEARCH COUNCIL

Bryggjubakki 12
Postrúm 259
FO-110 Tórshavn
Tel + 298 567800
gransking@gransking.fo www.gransking.fo

**Kom til kunnandi tiltak**
**um ES-fíggjaða gransking**

SEVENTH FRAMEWORK PROGRAMME

**Hósdagin 7. februar kl. 13.15 verður eitt kunnandi tiltak um ES-fíggjaða gransking og um, hvussu tað ber til hjá føroyskum granskarum at fyrireika seg til luttøku í FP7.**

Tiltakið verður á deildini hjá Søgu- og samfelagsdeildini í Jónas Broncksgøtu 25. Kunningartiltakið byrjar klokkan 13.15 og endar klokkan 16.00.

Tiltakið er ókeypis, og øll eru hjartaliga vælkomin.

**Skráin fyri tiltakið er hendan:**

**Kl. 13.15 – 13.30:**
Føroyska NCP-umboðið John D. Olsen býður vælkomin og kunnar yvirskipað um FP7

**Kl. 13.30 – 13.40:**
Gunnar Holm-Jacobsen, ráðgevi á Løgmansskrivstovuni: ***Tilsøgn um atlimaskap – og hvat so?***

**Kl. 13.40 – 14.10:**
Ólavur Gregersen, Bitland: Okkara royndir og ætlanir við rammuskráum hjá ES

**Kl. 14.10 – 14.30:**
Kaffisteðgur

**Kl. 14.30-15.30:**
Poul Petersen, senior ráðgevi innan ES-fíggjaða gransking á Keypmannahavnar Universiteti og NCP-umboð fyri Føroyar: ***Hvordan kan færøske forskere forberede sig til at deltage i FP7?***

**Kl. 15.30 – 16.00**
Spurningar og viðmerkingar annars

Hava tit spurningar, eru tit vælkomin at venda tykkum til Granskingarráðið, tel. 567800, ella umvegis t-post til john@gransking.fo ella kristianna@gransking.fo.

# Edmund Joensen fer at brúka nógva tíð á fólkating

**Sum formaður í Føroyanevnini hjá Fólkatinginum og limur í uttanríkisnevndini fær Edmund Joensen nógv at gera á fólkatingi. Umframt fólkatingsessin er fyriverandi løgtingsformaður meinigur løgtingslimur fyri Sambandsflokkin. Hann fer í farloyvi, tá tað er neyðugt**

**FÓLKATINGIÐ**
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Edmund Joensen ætlar sær at vera rættiliga aktivur í fólkatingsarbeiðinum. Hann varð valdur í fólkatingið á fólkatingsvalinum 13. november í fjør, men hann fór í farloyvi eftir at hava møtt á fyrsta fundinum, tí sum løgtingsformaður kann hann ikki hava annað starv.

- Eg hava boðað fólkatinginum frá, at eg tók við aftur sum løgtingið kom saman leygardagin, sigur Edmund Joensen, sum leygardagin aftur gjørdist fólkatingsmaður.

Edmund Joensen varð eisini valdur á fólkating í 1994. Men beint eftir valið, varð hann valdur til løgmann, og Johannes Marten Olsen røkti fólkatingsstarvið fram til valið í 1998, tá Sambandsflokkurin misti sæti á fólkatingi.

Edmund Joensen er formaður í Føroyanevndini hjá Fólkatinginum, og hann er eisini limur í Uttanríkisnevndini.

- Tí fari eg at hava nógv at gera í fólkatingsarbeiðinum – serliga í hesum nevndum, sigur Edmund Joensen. Hann sigur, at uttanríkisnevndini hevur sera nógv samskiftið við stjórnina í uttanríkismálum, og hon ferðast nógv til tey lond, sum stjórnin samskifti við.

Edmund Joensen nú meinigur tingmaður fyri Sambandsflokkin. Hann ætlar kortini at hava farloyvi í løgtinginum, tørvur er á tí í samabandi við fólkatingsstarvið.